## DAGSINS MEINING

# Setanarrøða og valrumbul

Danski forsætisráðharrin útskrivaði ikki val til fólkatingið, hóast tað gekk sum rótasúpan, at val fór at verða í heyst. Tað er lítið at ivast í, at hetta kom væl við hjá flestu flokkum her í Føroyum. Eitt fólkatingsval hevði skapt stóra órógv millum samgonguflokkarnar. Hesir flokkar eru júst við at finna áralagið, og eitt valstríð hevði alt annað líka órógvað áralagið hjá samgonguflokkunum. Valstríð hevði lamt politiska arbeiðið í einar tveir mánaðir, hetta hevði verið. Hetta hevði ongum gagnað. Samgonguflokkarnir kunnu tí bert vera fegnir um, at forsætisráðharrin ikki fall fyri freistingini at skriva út val, hóast hetta tóktist vera rætta løtan.

Tjóðveldisflokkurin er ivaleyst ikki minni fegin. Eitt fólkatingsval júst nú hevði ikki bert komið illa við - tað hevði verið einki minni enn ein katastrofa fyri flokkin. Flokkurin hevur sum øllum kunnugt stórar innanhýsis trupulleikar. Sjálvt um innanhýsis klandur vanliga ikki skaðar føroyskar flokkar, so eru trupulleikar Tjóðveldisfloksins í løtuni so álvarsamir, at flokkurin vildi havt trupult við at rikið eitt trúverdugt valstríð.

Sostatt eru øll ivaleyst fegin um støðuna, hvat valinum viðvíkur. Hinvegin gera flokkarnir helst klókt í at vera á varhaldi. Forsætisráðharrin er tikin úr leikum sum taktikari og kann tað tí væl henda, at hann tekur øll á bóli og skrivar út fólkatingsval í mars ella apríl um ikki fyrr. Fer hann longur út á árið 2005 rennur stjórnin seg í stórar innanlendis trupulleikar við teimum stóru bygnaðarbroytingunum á amtskommunala økinum eins og eitt fólkatingsval til heystar fer at gera tað torført at fáa eina líkinda borgarliga fíggjarlóg í hús.

Annars bar setanarrøðan dám av, at danir eru farnir inn í eitt valár. Forsætismálaráðharrin gav eina sera bjarta mynd av búskapinum og av støðuni sum heild í Danmark. Her gongur bara framá á øllum økjum, um farast skal eftir orðum forsætisráðharrans. Forsætisráðharrin boðaði frá, at nú skuldi ríkisfelagskapurin nútímansgerast, soleiðis at talan veruliga verður um ein felagskap millum javnt settar partar. Fyri okkum føroyingar var tað áhugavert, at forsætisráðharrin legði dent á at fáa sjálvstýrismálini avgreidd í ár. Hann gjørt tað púra greitt, at frá nú av eru tað Føroya løgting og landsstýrið, sum einsamøll stýra tilgongdini og eiga avgerðarrættin, tá tað ræður um sjálvstýrið. Vit kunnu fara so langt, sum vit ynskja tað heilt at markinum fyri ríkiseindini. Hetta kann samgongan bert vera nøgd við, meðan rættir fullveldismenn helst bíta á kampi. Soleiðis er nú einaferð í politikki. Tað gongur upp og niður.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Býráðs-imperialisma

**Hanus Vang**

**1. partur**



Í 1980 komu Hoyvík og Hvítanes uppí Tórshavnar Kommunu, og síðani eru vit undirløgd avgerðir býráðsins uppá gott og mest ilt.

Ongin fólkaatkvøða var um samanleggingina, hvørki her ella har. Teir arbeiða útfrá at demokrati er alt ov trupult og drúgvt. - Tá man hevur maktina.

Nú tjúgu og fýra ár seinni kann á mongum økjum sannast at vit vórðu "bóndafangaði" so dyggiligani.

Mafiur í Ruslandi og aðrastaðni kundu helst fingið væl av íblástri í Havn.

**Sandvíkar**

Ein av allar ljótastu gerðum teir fremja er at taka øki í Sandvíkum til skjótivøll. Ein skjótivøllur kann gerast næstan hvar sum helst, men tað eru bara einar Sandvíkar.

Tær eru eitt ótrúliga vakurt og deiligt pláss. Fyri fólk, fugl, seyð og komandi ættarlið.

Sigast skal at tær eru einasta lætt atkomuliga fjøruslætta pláss her á leið. Eitt guðs givið sálarbótarøki (ella rekreativt øki). Men tað røkkur meðalmeðviti í býráðnum ikki til at fata. Ei heldur hjá lands-býar-skipanarmyndugleikanum ella í yvirófriðingarnevndini.

Og óndskapurin toppar nú teir eisini fara at hegna fjøruna frá Sandvíkaryssuni og næstan inn til Víkina Føgru, saman við slættanum. Fyrndargamla rættin verður hegnað frá sum ein blindtarmur í skjótiøkinum.

Soleiðis verður fjøran totalfriðað fyri fólk, seyð og fugl. Hetta er álvarsligt brot á galdandi lógir, lunnindir og siðvenju, tí fjøran altíð hevur verið almenningur, har øll hava ávísan rætt.

Tá fer at liggja sera væl fyri at hegla alt til við blýggjhøglum og leirdúgvuskørum.

Og ferðaleiðarar fara at kunna greiða fremmandafólki í bussunum frá hvussu væl vit í Tórshavnar Kommunu duga at røkja okkara fagrastu náttúruvirðir.

--------

Í summar komu ternurnar í stórum meingi aftur í Sandvíkar, eina mest tí vit við dyggari løgregluhjálp hava hildið ólógligu skjótingini burtur í níggju ár.

Men hvat fara ternurnar at gera tá skjótingin byrjar aftur?

Og Jan, Marius og Simmi halda seg helst vera klókari enn ternurnar. Halda seg í minsta lagið hava rætt til hvat sum helst, fram um allar aðrar verur.

Men tá teir sleppa hetta, so mugu teirra avvarðandi myndugleikar vera eins sørir fyri klókskap og meðvit.

- framhald.

# Hjálpið strongdu børnunum

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur fyri Javnaðarflokkin*
*www.lindenskov.com*



VAL04

Tað vóru sera góð tíðindini, Tórshavnar kommuna kom út við fyrr í summar, tá ið hon boðaði frá, at nú er barnagarðstørvurin í kommununi loystur.

Barnagarðsmálið er eitt av teimum málunum, eg havi arbeitt hart fyri í býráðnum gjøgnum øll árini, eg havi sitið har. Tey fyrstu árini var tað sera trupult at fáa býráðslimir at skilja, at tað er gott fyri kommununa. Men upp undir seinasta val fingu vit allar býráðslimirnar at lova barnaansing. Hetta var ein stórsigur fyri okkum.

Nú er bíðilistin burtur. Men fyri at fáa tær seinastu restirnar av bíðilistanum vekk, valdi kommunan at trýsta fleiri børn inn á stovnarnar. Tað varð gjørt við at taka fleiri børn inn og at lækka barnagarðsaldurin niður í 2,5 ár. Frammanundan var barnagarðsaldurin 3 ár.

Hetta hevur gjørt, at umstøðurnar hjá bæði børnum og vaksnum á stovnunum nú eru trengri enn gott er. 2,5 ára gomul børn krevja meira umsorgan. Tey 2,5 ára gomlu klára seg ikki millum tey 3 - 6 ára gomlu.

Tað hevur meira enn so hent seg, at børn eru komin til tey vaksnu haldandi fyri oyruni, tí tey tola ikki gangin, nú fleiri børn er á sama øki.

Pedagogar hava eisini lagt til merkis, at børn hava broytt atburð, nú umstøðurnar eru blivnar trengri og harvið strongdari.

Eitt annað, kommunan ikki hevur tikið hædd fyri, er, at nakrir av barnagørðunum ikki hava umstøður at taka ímóti blæðubørnum. Og 2,5 ára gomul eru blæðubørn. 3 ára gomul børn eru vanliga sloppin av við blæðuna.

Eg vil gera vart við her, at sjálvt í barnaálitinum, sum vit skrivaðu undir kreppuni, mæltu vit staðiliga frá at økja um barnatalið á stovnunum. Har stendur, at tað beinleiðis er ábyrgdarleyst mótvegis børnunum at taka fleiri inn.

Í næstu býráðssetu vilja vit fáa hesi viðurskifti í rættlag, soleiðis at trivnaður hjá børnunum og starvsfólkunum verður settur í hásæti. Barnagarðsaldurin skal aftur setast til tað, hann var frammanundan broytingina. Trivnaður hjá børnunum, sum eru okkara framtíð má raðfestast høgt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


## VIÐMERKINGAR

# Ósakligur og lítið djúptøkin journalistikkur!

**Tórbjørn Jacobsen**
*stjóri*



Tað kemur sera óvart á øll, sum vara av einum felag, tá hetta sama felag verður hongt út, á fremstu síðu í landsins størsta blað, fyri at skrúva virðini í viðkomandi felag upp, við tí endamáli at varðveita eina positiva eginogn.

Tá orðið at **skrúva** virðini upp verður nýtt, so týður hetta í vanligum talumáli, at talan ikki er um verulig virði, men kunstiga skapt virði á einum bæði følskum og óreellum grundarlag.

Tað má standa einum og hvørjum greitt, at tá slíkar ákærur vera settar fram alment, so fær hetta álvarsligar avleiðingar við sær bæði fyri sjálvt felagið og íleggjararnar.

Álitið ímillum felagið og tess samstarvspartnarar fær eitt skot fyri bógvin og kreditvirðið versnar!

Ein slík álvarslig skuldseting má tí sum minstamark krevja haldgóða skjalprógvan og ítøkiligar grundgevingar.

Hvørjar eru so grundgevingarnar hjá Georg L. Petersen ?

Jú, ein einfald samanbering av roknskaparliga virðinum á rækjuskipinum M/S "Napoléon" við onnur rækjuskip er skottrygga prógvið fyri hesi sonevndu "**uppskrúving**" av virðinum og harvið eginognini hjá P/F Kongshavnar Útgerðarfelag.

Hetta er fullkomuliga burturvið og má sigast at verða bæði tilvildarligt og sera ósakligt.

Ein slík samanbering er av góðum grundum ikki ein próvgrund, sum kann nýtast til nakað sum helst, og als ikki til eina so álvarsliga skuldseting, sum at leggja eigararnar undir falskar upplýsingar mótvegis bæði fíggingarstovnum, skattavaldi og skrásetingarmyndugleika v.m.

Her er eyðsæð talan um beinleiðis skaðiligan journalistik, sum bert hevur til endamáls at undirgrava og oyðileggja umdømi hjá ávísum felag og møguliga ávísum persónum uttan nakað sum helst grundarlag yvirhøvur.

Hvørt talan er um persónligt agg, hevnisøku ella bara tápuliga sjikanu er so upp til hvønn einstakan at meta um, men ásannast má, at Georg L. Petersen er rættuliga langt úti at svimja, tá slíkar høpisleysar ákærur verða bornar fram á forsíðuni í landsins størsta blað!

Havast skal í hesum sambandi í huga, at felagið hevur skyldu til at halda seg til galdandi roknskaparlóg og skattareglur, tá bæði virði og eginogn verður uppgjørd. Avskrivingar verða framdar á hvørjum árið, soleiðis sum ásett í galdandi roknskaparreglum. Fullfíggjað skjalprógv fyri nýíløgum og umvælingum skulu leggjast á borði til eina og hvørja tíð, um virði á skipinum skal økjast. Grannskoðarin góðtekur heilt einfalt ikki uppskriving av nøkrum virðum uttan haldgóða grund og neyðug skjalprógv fyri hesum. Felagið er undir sama eftirliti, sum øll onnur feløg í Føroyum, og hevur í veruleikanum ongan møguleika fyri at villeiða lángevarar ella kreditorar við fiduskendum manipulatiónum og følskum virðum, so sum hetta umboðið fyri fjórðu statsmaktina vil vera við!

Roknskapurin hjá Kongshavnar Útgerðarfelag er almennur og ein og hvør sum hevur áhuga fyri hesum viðurskiftum kann fáa sær eitt eintak av hesum roknskapi.

Felagið dylir onki og heldur seg innan teir karmar sum galdandi lóg og reglur áseta.

Hervið er tað okkara vón, at hesar skilaleysu skuldsetingar um "uppskrúvað virði" eru væl og virðiliga mótprógvaðar, og at greinin hjá Georg L. Petersen ikki skal verða tikin fyri meira enn tað hon er, nevniliga ósaklig journalistisk manipulatión, tá hon er alra ringast.

Nú føroyski virðisbrævamarknaðurin fer úr barkastokki, er tað mangt sum bendir á, at fjórða statsmaktin, í hvussu er ikki Dimmalætting og Georg L. Petersen, eru búgvin til hetta nýbrotið í føroyska peningaheiminum. Ein so skilaleys grein sum omanfyrinevnda hevði longu havt tikið stólparnar undan viðkomandi felag og jarðlagt tað av fákunnu og býttiskapi, hjá einum tilvildarligum journalisti, ið ikki megnar at lesa seg fram ígjøgnum ein roknskap øðrvísi enn tá ið Belsebub skúrar seg fram ígjøgnum tær heilagu skriftirnar.

# Sleppið KODA-avgjaldinum

**TÍÐINDASKRIV**
*Útvarp Føroya*

Felagsskapurin KODA hevur sett fram krav um, at handlar, virkir og almennir stovnar í Føroyum skulu gjalda KODA-avgjald, um tey velja at geva starvsfólki og viðskiftafólki møguleika fyri at hoyra sendingar útvarpsins. KODA umsitir upphavsrættindini hjá tónaskaldum, yrkjarum og útgevarum.

Útvarp Føroya hevur í dag í skrivi til KODA heitt á felagsskapin um at sleppa ætlanini um at krevja avgjald frá handlum, virkjum og almennum stovnum.

Í sínum grundgevingum vísir ÚF á, at øll húski, virkir og stovnar, sum hava útvarpsmóttakara, hava skyldu til at gjalda útvarpsgjald, og at ÚF rindar KODA avgjald fyri rættindini at senda tónleik til tey, sum rinda útvarpsgjald. Tí mugu øll hava rætt til at hoyra sendingar útvarpsins, uttan at skula lata eyka gjald til KODA.

ÚF rindar í løtuni útvið eina millión krónur árliga fyri rættindini at spæla tónleik.

Í skrivinum til KODA vísir útvarpið eisini á, at átakið hjá felagsskapinum móti handlum, virkjum og almennum stovnum hevur við sær, at beint verður fyri tí gomlu siðvenjuni, at lurtararnir eisini hava møguleika fyri at hoyra sendingar útvarpsins á arbeiðsplássum og almennum støðum.

# Viðmerking til Jógvan Jespersen, ÚF-stjóra

**Súni Selfoss**
*starvsfólk í ÚF og nevndarlimur í Starvsmannafelagnum*

Í samband við grein, sum stendur í seinasta Starvsblaðið hevur tú »Aftursvar til Starvsmannafelagið« í Dimmu og Sosialinum 06.10.2004

Í greinini sigur tú millum annað:

*Vit hava bara livað í tí trúgv, at felagið hevur góðtikið hesa mannagongd. Ein av nevndarlimum felagsins er í starvi í ÚF, og tí hava vit tikið sum givið, at viðkomandi ella okkurt av álitisfólkunum gjørdi vart við seg, um felagið ikki góðtók ta mannagongd, sum hevur verið brúkt, og sum øll hava kent.*

Her má eg koma við eini rættleiðing til tín Jógvan Jespersen, tí tað er ikki rætt, at eg ikki havi gjørt vart við starvsetanarpolitikkin hjá Útvarpinum, og tað vita tey flestu ið starvast í ÚF.

Í rættuliga nógvum førum, - kanska ikki øllum -, havi eg tikið málið upp við teg, bæði tá eg var álitisfólk og nú eg eri nevndarlimur í Starvsmannafelagnum.

Men sum teimum flestu kunnugt er ikki so lætt at treingja ígjøgnum ella koma í ein dialog við teg, tí sama svar kemur so at siga hvørjaferð, »Tað er ikki tað sama at fáa starvsfólk til útvarpsarbeiði sum onnur almenn arbeiði«.

Tað er ein vánalig undanførsla, at geva mær og álitisfólkunum skuldina fyri, at tú ikki heldur sáttmálan. Tú veitst, at á hvørjum ári er summarferia, tú veist, at starvsfólkini skulu hava sína feriu, og tú veist, at skal ÚF senda summarskránna, so hevur tú brúk fyri avloysarum og tú veitst eisini, at øll størv skulu lýsast leys!

So einfalt er tað.

Eitt annað er so, at í nógvum førum verða tey (avloysarar og fyribils sett) verandi í starvi eftir at avloysaratíðin ella fyribilstíðini er farin. Tað haldi eg ikki tú skal harta okkum fyri at so er. Og her eru eisini greiðar ásetingar í sáttmálanum.

Tú ert ein av teimum fáu stovnsleiðarunum, sum ikki virðir tann almenna starvssetanarpolitikkin, sum Lønardeildin eisini metir, er eitt krav og at hann (starvssetanarpolitikkurin) skal haldast.

Men vit kunnu nú hóast alt fegnast um og staðfesta, at tú framyvir fer at halda teg til sáttmálaásetingarar!

# Trettan býráðslimir eru fýra ov fáir

**Klæmint Olsen**



VAL04

Tórshavnar kommuna fevnir um 40% av Føroya fólki. Kommunan er tískil í heilt serligari støðu. Kommunan er so nógv størri enn allar hinar. Tíverri er fyrilit á ongan hátt tikið fyri hesum í nýggju kommunlógini. Hvørki so ella so. Heldur ikki, tá ið tað snýr seg um talið av býráðslimum.

Hyggja vit at øðrum kommunum í Føroyum, gerst beinanvegin greitt, at talan er um grefligt skeivbýti. Um ársskiftið verða vit knappliga 20.000 íbúgvar í Tórshavnar kommunu. Kommunala umboðanin er sostatt 1:1.500. Í Klaksvík er hon minni enn 1:500, og aðrastaðni sjálvsagt væl minni. Í Nuuk eru 17 býráðslimir, og har búgva færri enn 14.000. Í Danmark skal býurin vanliga vera reiðuliga stórur - nakað væl størri enn Havnin - áðrenn býtið gerst 1:1.500.

Avmarkaða talið av býráðslimum í Havn skríggjar sostatt til himins. Fólkaræðið í økinum verður ikki virt. Ikki bara er torført hjá smærri flokkum at vinna sær umboðan, men hjá einum uttanflokkalista ella áhugabólki er tað so at siga ógjørligt. Og er ikki okkurt grundleggjandi galið, tá ið eitt øki hevur sama tal av løgtingslimum og kommunustýrislimum?

Lukkutíð er tørvur ikki á nakrari lógarbroyting, tí kommunulógin heimilar upp til 17 býráðslimir, hóast tað helst átti at verið hægri. Talan er tí bara um eina lítla broyting av starvsskipanini. Tá ið býráðið ikki sjálvt skjýtur hetta upp, er einki meira natúrligt, enn at landsstýrismaðurin í kommunumálum fer til verka og rættar stóra órættin. Hann er eftirlitsmyndugleiki, og hann skal góðkenna starvsskipanina. Treingir landsstýrismaðurin til eina grundgeving, kann hann vísa til, at samanleggingar hava verið, og at kommunan er stórliga vaksin.

Hetta skriv er tískil sent landsstýrismanninum í kommunumálum við áheitan um alt fyri eitt at gera nakað við málið. Tórshavnar kommuna og flokkarnar á løgtingi hava eisini fingið avrit.